# Fiskur selur ikki list, list selur fisk

ODDFRÍÐUR MARNI RASMUSSEN
formaður í Listafólkasambandi Føroya



Í Dimmalætting 24. august hevur Beata L. Samuelsen áhugavert viðtal við stjóran, Ragnar Siil og ráðgevan, Jorma Sarv úr estlendska mentamálaráðnum.

Listafólkasambandið hevði eisini fund við hesar báðar ógvuliga frúntligu menn úr Estlandi. Vanliga hugsanin um Estland er, at hetta er eitt eysturevropesikt land, ið ikki er eins framkomið og vit eru. Tað sást eisini á viðtaluni, at her er talan um eitt land, har fólkið ikki hevur tað so gott sum vit. Innflatiónin í Estlandi liggur um seks prosent og arbeiðsloysi er um 15 prosent. Vit hava teir seinastu nógvu mánaðirnar jabba um kreppu og eg veit ikki hvat. Politikarar hava staðið í beinum raði og roynt at mana fram eina kreppu. Henda sokallaða kreppan, vit hava her á landi, hevði verið ein hin størsta framgongdin í estlendskari søgu, var hon har, so tað velst um, hvussu forkelað eyguni eru, sum síggja.

Tað, sum ikki kom fram í viðtaluna, og sum vit tosaðu við teir um, var, hvussu listafólkini høvdu tað í Estlandi samanborið við okkum, sum her á landi starvast við list. Eg gjørdist rættiliga skelkaður av, hvussu frammaliga tey eru í Estlandi, bera vit estlendingar saman við okkara sokkallaða framkomna og mentaða land.

Føroyskir politikarar hava nógv at læra. Grúiliga nógv. Fari her at nevna nøkur mál, sum hesir so arbeiðsfúsu fulltrúarnir úr estlenska mentamálaraðnum søgdu okkum, at listafólk í Estlandi hava, men sum vit ikki hava.

Mentamálaráðið í Estlandi hevur í samstarvi við Talinn kommunu keypt 50 gamlar ídnaðarbygningar, sum teir hava gjørt um til sjónleikahús, listabýli, atelier, skrivstovur til rithøvundar, framsýningarhøllir og annað.

Teir hava eina serskattaskipan til listafólk, tí at hesi detta altíð ímillum eina A-skattaskipan og eina B-skattaskipan.

Teir hava eina lønartrygd, ið tryggjar listafólki frið at skapa síni verk.

Teir gjalda fyri at fáa listafólk á skeið í fíggjarstýring, soleiðis, at listafólkini betur sjálvi kunnu promovera sína list.

Enntá hava teir eina arbeiðsloysisskipan, har listafólk, ið eru komin til skaða ella hava eina skapanarblokadu, kunnu fáa pengar.

Her sita vit í Føroyum og rósa okkara skipan. Tað er til at skammast yvir. Tað er beinleiðis flóvisligt at tosa við slíkar menn og at skula greiða teimum frá, hvussu vit hava tað, við øllum teimum pengunum, sum vit hava á ráða yvir her á landi, og at her tosa vit fyri deyvum oyrum.

At enda við, so løgdu hesir báðir stóran dent á, hvussu stóran týdning tað hevði, at listafólk høvdu eitt umhvørvið, har hugskot og tankar kundu blóma.

Okkurt er grundleggjandi galið í Føroyum. Ilt er at siga, um talan er um ov vánaligar fulltrúar hjá mentamálaráðnum ella um talan er um mentamálaráðharrar, ið ikki vilja arbeiða fyri livikorunum hjá listafólkum, tí at ráðharrarnir ikki hava skilt, hvønn týdning listin hevur fyri samfelagið. Tað mátti verið ein góð avbjóðing hjá einum politikara at arbeitt við slíkum, sum í øllum øðrum londum verður mett sum ein munagóð íløga fyri samfelagið.

Kanska eru vit (eins og í Pisakanningini) eisini aftast á hesum økinum. Tað rokni eg tíanverri við. Men eg bjóði politikarunum av at prógva hitt øvugta.

# Javnstøðumálaráðharrin – einaferð enn

KRISTIANNA WINTHER POULSEN
forkvinna í Javnstøðunevndini



So hevði Jóhan Dahl aftur eina útsøgn um sítt málsøkið, javnstøðu. Hesaferð vóru boð eftir honum í útvarpstíðindunum fríggjakvøldið 26. august. Orsøkin var, at almennu Føroyar saman við Danmark hava verið til próvtøku í, hvussu røsk vit eru at halda CEDAW-sáttmálan, sum er ein ST-sáttmáli við til endamáli at taka av mismun vegna kyn móti konufólki. Sáttmálin hevur verið í gildi í Føroyum síðani 1987.

**Kvotur**

Eitt av tilmælunum frá CEDAW-nevndini hjá ST fyri at økja um javnstøðu í føroyska samfelagnum er at fáa í lag kvotur, so at fleiri konufólk verða umboðað í leiðslum. Hetta ber sambært Jóhan Dahl ikki til, tí at tað eru ov fá konufólk í Føroyum. Og av tí at vit eru eitt samfelag við kvinnutroti, kunnu kvotur skapa eins nógvar trupulleikar sum loysnir, segði Jóhan Dahl í útvarpstíðindunum hetta kvøldið.

Hyggja vit at tølunum, síggja vit, at 1. januar í ár búðu 25.370 menn og 23.408 kvinnur í Føroyum. Lutfallið er 52% av monnum og 48% av kvinnum. Í aldursbólkinum 25 til 67 ár vóru tølini 13.678 menn og 11.946 kvinnur. Her er lutfallið 53% av monnum og 47% av kvinnum.

Hesi tøl siga okkum, at einki hald er í útsøgnini hjá landsstýrismanninum í javnstøðumálum, tá ið hann sigur, at kvotur kunnu gerast ein trupulleiki orsakað av kvinnutroti.

Kvotur eru ein møguleiki í arbeiðinum fyri øktari javnstøðu. Spurningurin um, hvørt kvotur er rætta loysnin, er stórur og eigur at verða væl og virðiliga viðgjørdur, áðrenn ein slík avgerð verður tikin. Men at okkara javnstøðumálaráðharri vísir hesum uppskoti aftur við kvinnutroti sum einastu grundgeving, er rætt og slætt ov ússaligt. Tíverri tykist hann brúka hetta álvarsmál sum eina vána umbering fyri vantandi viljan, ella evnini, at taka javnstøðu í álvara.

**Logikkurin**

Umframt at vera landsstýrismaður í javnstøðumálum er Jóhan Dahl eisini landsstýrismaður í vinnumálum. Um hann á hesum øki brúkar somu tankagongd, sum hann brúkar í javnstøðuøkinum, átti hann at komið til ta niðurstøðu, at tað ikki ber til at arbeiða við nýskapan í Føroyum, tí at føroyska vinnulívið er so einstáttað. Merkir hetta, at alt arbeiðið frá almennari síðu við vinnuligari nýskapan er til fánýtis?

**Hvørjar førleikar?**

Hetta kvøldið segði landsstýrismaðurin eisini við útvarpið, at tað einki krav er í javnstøðulógini um, at tað skal vera javnstøða í nevndum, og at man hóast alt skal hyggja at førleikunum.

Hvørjir hesir førleikar eru, lysti meg vita. Tí í lesarabrævi í Dimmu 6. mai 2009 roynir Jóhan Dahl at greiða frá, hvørjir førleikar skuldu til, tá ið nevndin í Atlantic Airways varð vald. Hann skrivar millum annað: 'Yvirskipað sæð hevði eg í huganum, at nevndin skuldi vera sett saman soleiðis, at hon á ein effektivan og frameftirlítandi hátt er før fyri at taka sær av sínum leiðsluuppgávum - herundir strategisku uppgávunum og eftirlitsuppgávunum – og samstundis vera ein konstruktivur og skikkaður sparringspartnari fyri stjórnina'.

So vita vit tað. At í høvdi Jóhan Dahls er ikki eitt einasta konufólk, hvørki í Føroyum ella í øðrum Norðurlondum, sum hevur hasar førleikarnar.

**Málsøkið**

Jóhan Dahl hevur ábyrgd av málsøkinum javnstøða, um hann vil tað ella ikki. Nú eitt ár er liðið, síðani sitandi samgonga kom til, er tíð uppá, at Jóhan Dahl saman við aðalstjóra sínum raðfestir arbeiðsorkuna í Vinnu- og javnstøðumálaráðnum, soleiðis at okkurt starvsfólkið í ráðnum fær umstøður at arbeiða við javnstøðu. Alt annað er at misrøkja hetta málsøkið.

Í sama viðfangi kundi eg hugsað mær at fingið at vitað, um løgmaður og partamaður Jóhan Dahls er nøgdur við tá arbeiðsorku og tann vilja, sum landsstýrismaðurin í vinnu- og javnstøðumálum leggur í eitt av sínum málsøkjum. Ella er eisini Kaj Leo Johannesen líkasælur við ta risa avbjóðing, sum arbeiðið fyri øktari javnstøðu í føroyska samfelagnum er?

# Sandoyartunnilin

GERHARD LOGNBERG
løgtingslimur



Helgi Abrahamsen løgtingslimur hevði eina heilsan til sandoyarfólk ella rættari sagt til sóknina.

Hvat er tað, sum fær ein ungan mann at koma við slíkum boðskapi.

Jú hatta var sera negativt og óreint. Man kann siga at suðurøkið í Føroyum er í fríum falli.

**Fjøður í hattin**

Jú helst roynur hesin ungi fuglfirðingurin at fáa eina fjøður í hattin frá teimum, sum ikki unna suðurøkinum sámulig kor. Tað ger Helgi við at sparka ein, sum liggur. Tað plagdi ikki at vera mett sum ein rættur maður.

Hvar er trupulleikin. Eg eri partur av eini samgongu, og tað er tú eisini.

Tað var ein av tínum partamonnum, sum segði í hinari ABC-samgonguni, at ein tunnil skuldi ikki gerast til Sandoynna, meðan búskapurin var heitur. Nú er búskapurin kólnaður, og teir vísu uttan í heimi meina, at heimskreppan fer at hæsa av. Gævi sætt at so var.

Helgi, vit hava samtykt P/f Sandoyartunnilin. So Annika Olsen eigur at fáa tey viðurskiftini í ordan.

Hin parturin av avtaluni var og er, at peningur, sum hevur verið goldin til Noyrðoyatunnilin skal í Sandoyartunnilin uml. 40 mió. nú í 2009-2010 og so framvegis.

**Ung**

Minst til Helgi, tú meinar, at vit eru ov fá at gera slíka íløgu til.

Helst hugsar tú Helgi so egoistiskt: tunnil til Sandoy/Suðurøkið koma eg og míni helst ikki at hava brúk fyri, tað eru ikki míni børn, sum vera noydd at flyta heiman í frá.

Men Helgi Abrahamsen, ístaðin fyri eru tað okkara børn, okkara abbabørn, okkara ungdómur, sum noyðist at flyta, tá tey fara úr 10. flokki og eru burtur alla vikuna og til síðst flyta. Harvið minkar suðurøkið meir og meir.

Tað eru okkara arbeiðsfólk, handverkarar, sum fara til arbeiðis inn á meginøkið og eru heiman í frá í 12 tímar hvønn dag.

Men sjálvsagt heldur tú, sum so, at hatta er ikki mín trupulleiki, hóast eitt valdømi. Tí Helgi, tú kann seta teg í bilin og koyra til arbeiðis. Og koyra tíni børn har tey skulu.

Nei latið okkum halda gjørdar avtalur.

Til síðst góði Helgi, hasin óndskapurin móti suðurøkinum í Føroyum klæðir tær ikki.

Lesið Sosialin -so eru tit við!